# Nøvn

# Ein heilsa til pápa mín Edvin Danielsen

## á 85 ára degi hansara 2. des. 2010



Pápi var føddur 2. des.1925. Foreldur hansara vóru Lisa og Samuel Johannes Danielsen, vanliga nevndur Sammajóannes, úr Kollafirði.

Pápi var bert ein lítil smádrongur, tá hann misti mammu sína, og kom hann tí at búgva hjá familju í Rituvík í eina tíð. Hann var eisini eitt skifti hjá stóra Martin á Vatnsoyrum, men kom so til Klaksvíkar, har hann búsettist. Hann giftist við mammu, Lenu Danielsen, úr Fuglafirði, í 1952. Tey vórðu gift í Fuglafirði, men settu búgv í Klaksvík beinanvegin í húsum á Selheyggi (tvíhúsum), sum hann hevði bygt saman við ungdómsvini sínum, Elieser Jóhannesen, vanliga nevndur Essa.

Tey fingu trý børn. Eg sjálv Lis eri elst, síðani systir mín Elsebeth og so beiggi okkara Ejler. Vit fingu ta stóru sorg fyrst at missa Elsebeth 1.jóladag 1965, bara 6 ára gamla, og síðani Ejler í mars 1993, bara 27 ára gamlan. Hann hevði júst sett búgv, var giftur við Eyðbritt, og tey áttu tvær fittar smágentur og vóru farin í nýggju prýðiligu hús síni, sum standa undir Hálsi. So hetta vóru dyggir smeitir fyri okkum. Í 1998 høvdu vit ta stóru sorg at missa mammu eisini, tað var ógvuliga tungt fyri pápa og okkum øll, men Harrin, sum vit hava sett okkara álit á, hevur ført okkum ígjøgnum alt hetta. Lovað veri navn hansara.

Pápi hevur verið ein raskur arbeiðsmaður. Í yngri árum fekst hann m.a. við málaraarbeiði. Hann arbeiddi eina tíð hjá firma J.J. Jacobsen, gekk vakt í turkihúsinum hjá teimum og passaði ketilin. Seinni fór hann at arbeiða sum borari. Hann var við at gera Oyggjarvegin og bæði bergholini norður gjøgnum fjøllini til Árnafjarðar og Norðdepils. Ta seinastu tíðina av arbeiðslívi hansara var hann kranførari hjá Klaksvíkar kommunu.

Vit høvdu eitt gott og trygt heim, har vit vórðu lærd upp í øllum góðum dygdum, og best av øllum, foreldrini leiddu okkum til trúnna á Jesus í okkara barnaárum. Eitt, sum eg minnist frá barnaárum mínum, var, at eg slapp við babba, tá ið hann saman við øðrum monnum fór at halda møti, t. d. við "Sendiboðnum", einum báti, teir høvdu tá til at sigla til aðrar bygdir við og boða hin góða boðskapin fyri fólkinum.

Góði babba! Takk fyri alt, sum tú hevur verið og ert fyri okkum, eisini fyri abbabørnini og langabbabørnini. Nú gongur sólin vesturum hjá tær og stendur lágt, men tú ert treystur, tú hvílir í trúnni. Tað er skilligt, sjálvt um tú ikki longur kanst siga okkum tað við orðum. Tað verður ikki so leingi, til vit øll vera har, sum mamma, Elsebeth og Ejler eru. Har verður gott at vera.

Birgir og eg ynskja tær so hjartaliga tillukku við degnum og eitt stilt og friðfult lívskvøld.

**Lis**

## Føðingar

19. november fingu Annika Jespersen og Pól Arni Holm, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3534 gr.

28. november fingu Randi og Edni Lisberg, Kristiansund í Norra, tvíburar, drong og gentu. Sonurin var 40 cm langur og vigaði 1500 gr, dótturin 37 cm long og vigaði 1060 gr.

1. desember fingu Beinta Berg og Jens Dam Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2820 gr.

6. desember fingu Anna Olsen og Sjúrður Arnbjarnarson, Skarvanesi, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2390 gr.

6. desember fingu Anna Wenningstedt og Jón E. Glyvradal, Glyvru, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 1485 gr.

---

## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
og hjálpsemi, tá okkara kæri maður,
pápi, verpápi og abbi

**Hans M. Petersen**
**Vestmanna**

doyði og varð jarðaður.

Takk til Jonhard Jógvansson fyri góð orð í kapellinum og takk til tykkum, sum komu í kapellið.
Takk til Ingu Poulsen Dam, prest, fyri góð og vøkur orð í kirkjuni. Takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravarar.
Takk fyri alla góða hjálp við ervið.
Takk fyri vakrar blómur, kransar, heilsanir og gávur til Vestmanna kirkju. Takk til tykkum øll, ið fylgdu Hans til hansara seinasta hvíldarstað.
Vit ynskja øllum eini
gleðilig jól og eydnuríkt komandi ár.

**Bente, Flóvin við familju**
**og Svanna við familju**

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum
og kenningum, at okkara kæri bróðir,
svágur, mammu og ommubeiggi

**Helgi Fríði Weihe**
**Tórshavn**

andaðist 6. desember, 64 ára gamal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum
fríggjadagin kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Havnar
kirkju leygardagin kl. 13.00.
Sungið verður úr Sálmabókini.

***Fyri tey avvarðandi***
**Sólrun og Hildigunn**

Tey, ið vilja minnast Helga, kunnu í staðin fyri blómur el. krans lata Krabbameinsfelagnum eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum
og kenningum, at elskaði maður, pápi, verpápi,
abbi og langabbi okkara

**Justi Poulsen**
**Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum
týsdagin, 80 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum
fríggjadagin kl. 16.00.
Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum
leygardagin kl. 11.30

***Familjunnar vegna***
**Irena, Sofus, Birthe, Guttormur, Esther og Heidi**

Tey, ið vilja minnast Justi, kunnu lata hjálparfelagsskapinum Hjálpin eina gávu, konta 6460-997.457.3 í Føroya Banka